Speiskt sprell

Sjónleikarahúsi› byrja›i n‡ggja túsundári› vi› álvarsemi. Cabarét Óli P. - ár 2000 ár veg er eingin Ólavssøkuella studentakabarett.

Kabarettin er ein blandingur av sjónleiki og sangleiki.

DÁNJAL HØJGAARD

Leikurin hjá Gullu Øregaard og Óla Petersen er ein fer› gjøgnum kreppuna í 90 -unum. Ein sorgarleikur, sum kortini ikki er syrgiligur, tí at hann ver›ur borin uppi av humori og satiru, sum vi›hvørt er bítandi hvøss.

Kabarettin er ein blandingur av sjónleiki og sangleiki. Talan er um brot, smáar sketjur, sum ein frásøguma›ur - ein íspegil - skal binda saman í eina heild.

90-ini og kreppan

Leikurin sigur søguna um familjunar, sum noyddust at r‡ma frá húsi og heimi. Um tann hjartaleysa kapitalistin og ríkmannafamiljuna, sum fer á skíferiu til Eysturríkis í gyltum gullbúnum, men fer so syrgiliga av døgum í fer›sluvanlukku. Vit hitta drykkjumannin, sum hoknar undir byr›uni og politikararnar, i› høvdu ábyrgdina.

Frásøgnin er merkt av or›knøppu vi›merkingunum hjá Óla P. Í mongum førum er frásøgnin flutt í tí› og sta›i›, sum t.d. tá vit síggja politikararnar verja seg mótvegis fólkinum. Her eru høvundarnir eftir øllum at døma farnir heilt aftur í rómverjatí›ina, og í hesum broti hevur leikurin ein farra av Jesus Christ Superstar yvir sær.

Strikurnar hjá Óla

Strikurnar hjá Óla P. síggjast aftur í leikinum. Inn ímillum eru brot, sum næstan kundu sta›i› á baksí›uni á Sosialinum. Og tú kennir typurnar aftur. Føroyingin í posatroyggju. Keppin. Balli› í munnklovanum. Og so Balleba, sum allatí›ina kemur bóltandi inn á pallin.

Tónleikurin er eisini ein t‡dningarmikil táttur í Cabarét Óli P - ár 2000 á veg. Leikurin byrjar vi› einum samtí›arkvæ›i, sum Jógvan Bærentsen hevur yrkt og Knút Olsen hevur sett lag til. Haraftruat er annar nútímans tónleikur og a›ir tekstir eftir Gunnar Hoydal, Una Arge, Martin Joensen og Knút Olsen.

Og sum vera man eru dansigentur vi› í eini cabarét. Og tá beinini speika upp ímóti R.C Effersøe kennist ta› sum at Sjónleikarahúsi› er blivi› til eina westernsalong.

Cabarét Óli P - ár 2000 á veg særir ongan og peikar ikki á ávísar syndabukkar. Her eru øll meira ella minni offur.

Havnar Handverkarafelag aðalfund:

Tilevnað forkunnuga pensiónsskipan

Nýggja pensiónsskipanin hjá Havnar Handverkarafelag hevur vakt so stóran ans í grannalondum okkara, at fleiri útlendsk fakfeløg hava víst skipanini áhuga

Mynd:

Eftir tvey ára fyrireikingararbeiði, hevur ein arbeiðsbólkur hjá Havnar Handverkarafelag tilevnað eina nýggja og slóðbrótandi pensiónsskipan, sum hevur so nógvar fyrimunir, at fleiri fakfeløg í grannalondum okkara hava víst henni sera stóran áhuga

TERJI NIELSEN

Á kunnandi limafundi á Hotel Føroyum seinasta mikukvøld, legði nevndin í Havnar Handverkarafelag nýggju pensiónsskipanina, sum felagið sjálvt hevur greitt úr hondum, fram fyri limum sínum.

Inngjaldið verður óbroytt

Í høvuðsheitinum kann sigast, at nýggja skipanin fer at løna seg betur fyri tann einstaka handverkaran, tá ið hann fer á pensión.

Hóast nýggja skipanin gevur tí einstaka handverkaranum meiri í pensión, so merkir hetta ikki, at limirnir í Havnar Handverkarafelag skulu gjalda meiri í pensiónskassan. Inngjaldið verður óbroytt; tað vil siga, at arbeiðsgevarin rindar 2%, meðan handverkarafelagið somuleiðis rindar 2%, altso 4% íalt.

Útrokningar hjá arbeiðsbólkinum vísa, at varisliga mett kann ein limur, sum umvegis tey 4% rindar 4.000 krónur í nýggju pensiónsskipanina um árið, fáa peningin aftur fýrafaldaðan, tá ið hann gerst pensionist. Tað vil siga 16.000 krónur. Um limurin hevur høgan ancennitet, tað vil siga, um hann hevur verið leingi við í skipanini, so veksur upphæddin munandi.

Solidarisk skipan

Nevndin í Havnar Handverkarafelag vísir á, at skipanin er solidarisk. Tað merkir, at allir limir gjalda 4.000 krónur í skipanina um árið. Hjá teimum flestu limunum í felagnum fara tey 4%, sum verða goldin í pensiónskassar, væl upp um tær 4.000 krónurnar, og í slíkum førum fer hvørt oyra, sum verður goldið meiri enn 4.000 krónur, í eina kapitalpensión.

Nýggja solidariska skipanin kemur at virka á tann hátt, at tá ið handverkarin gerst pensionist, fer hann at fáa eina fasta upphædd hvønn mánað, so leingi sum hann livir. Alt eftir hvussu stóran ancennitet, ið handverkarin hevur í skipanini, gerst mánaðarliga pensiónin hjá honum, men tað er ikki óhugsandi, at í miðal fer ein pensioneraður handverkari at fáa eini 3.000 krónur aftrat fólkapensiónini útgoldnar frá skipanini hvønn mánað.

Við at hava bæði nýggju pensiónsskipanina umframt vanligu kapitalpensiónina hjá handverkarafelagnum, fer handverkarin at vera væl fyri, tá ið hann verður pensioneraður. Hann fær ein posa við pengum frá kapitalpensiónini, umframt at hann fer at fáa eina fasta upphædd hvønn mánað.

Arvarættindini eru eisini tryggjað

Sum nakað heilt nýtt, hevur Havnar Handverkarafelag tilevnað nýggju pensiónsskipanina soleiðis, at hon er arvatryggjað í heili 10 ár.

Hetta merkir, at um tann pensioneraði handverkarin doyr 2 ár eftir, at hann er farin á pensión, so arvar konan ella onnur av hansara nærmastu pensiónsútgjaldið tey næstu átta árini. Hetta er nakað heilt nýtt í føroyskum pensiónsviðurskiftum. Somuleiðis er hetta heilt nýtt í Norðanlondum, og sambært formanninum í Havnar Handverkarafelag, Eyðfinni Petersen, er nýggja pensiónsskipanin tann fyrsta arvatryggjaða í Norðanlondum.

Orsøkin til, at nýggja skipanin kann bera seg við so mikið høgum upphæddum, er tann, at Havnar Handverkarafelag upprættar ein grunn til skipanina, sum fær eitt stovnsfæ frá felagnum, sum fer at liggja um hálvafimtu millión krónur. Rentirnar av hesi stóru upphædd fáa skipanina til at bera seg.

Hjá summum kann tað kanska tykjast eitt sindur løgið, at teir eldru limirnir í Havnar Handverkarafelag fyrstu árini fara at fáa meiri útgoldið frá nýggju pensiónsskipanini, enn teir yngru gjalda inn, men í veruleikanum er tað so, at teir eldru bert fáa eitt sindur aftur av tí stovnsfæ, sum teir sjálvir hava verið við til at gjalda.

Alt er føroyskt framleitt

Tað serliga við hesi nýggju pensiónsskipanini hjá Havnar Handverkarafelag er, at øll skipanin, sum hon er, er føroysk framleiðsla. Sjálvt hugskotið til skipanina, bygnaðurin av skipanini, og enntá teldubókhaldsskipanin, ið nýtast skal til pensiónirnar, er framleidd í Føroyum. Tað er Vision Software í Klaksvík, sum hevur framleitt telduskipanina.

Eyðfinnn Petersen, formaður í Havnar Handverkarafelag, sigur, at teir eru sera ernir av skipanini, og hann sigur, at advokaturin hjá felagnum, Óla Jákup Kristoffersen, eigur sín stóra part av æruni fyri nýggju pensiónsskipanina hjá handverkarunum í høvuðsstaðnum.

Eftir at nevndin í Havnar Handverkarafelag hevði kunnað limirnar um nýggju skipanina, var stovnandi aðalfundur av pensiónsgrunninum, sum fer at vera rættuliga atskiltur frá øllum øðrum aktiviteti hjá Havnar Handverkarafelag. Aðalfundurin samtykti einmælt at seta á stovn pensiónsgrunnin, og fyrsta nevndin hjá grunninum bleiv eisini vald. Í hana komu Tummas Kjærbo, Bjarni Petursson, Eli Brimsvík, Jens Meitilberg og Eyðfinn Petersen.

Fleiri av hesum høvdu verið við í arbeiðsbólkinum, sum hevði tilevnað pensiónsskipanina, og tað vóru eingi onnur valevni til nevndina.

Skeið í innaneftirliti

Skipað verður fyri skeiði í innaneftirliti. Skeiðið er í trimum eindum. Til ber at melda seg til eina, tvær ella tríggjar eindirnar. Pláss er fyri 20 luttakarum á hvørjari eind.

Eind 1: Heilsufrøðilig viðurskifti — 31. jan., 1. og 2. febr. 2000
Eind 2: HACCP — 14., 15. og 16. febr. 2000
Eind 3: Íverksetan og viðlíkahald av innaneftirlitinum — 28. og 29. febr. og 1. mars 2000

Málbólkur: Stjórar, góðskuleiðarar og starvsfólk, ið saman við góðskuleiðaranum hava ein virknan leiklut í innaneftirlitsarbeiðinum á fiskavirkjum, kryvjivirkjum, verksmiðjuskipum o.ø.

Undirvísarar: Serfrøðingar í innaneftirliti.

Stað: Hotel Føroyar í Havn, allar dagar kl. 9.00-17.00.

Skeiðkostnaður: Kr. 3.000 fyri hvørja eind (verður kravt inn undan skeiðinum)

Próvtøka: Skipað verður fyri próvtøku í øllum trimum eindunum eftir lokið skeið.

Frálæran fevnir m.a. um:
Småverulívfrøði, framleiðsluumhvørvið, reingerð, sjálvrøkt, vandamálsgreining, góðskuskoðan, skjalastýring, uppbygging og íverksetan av innaneftirliti.

Freistin at boða frá luttøku er **19. januar 2000.** Tilmelding fer fram við at ringja til Fiskivinnuskúlan á tlf. 424573, ella um teldupost: fiskvest@fiskvest.fo. Til ber eisini at senda ella faxa okkum innskrivingarseðilin niðanfyri. **Tilmelding er bindandi.** Skeiðið er treytað av nóg stórari undirtøku.

Fiskivinnuskúlin
Postrúm 96, 350 Vestmanna
Tlf. 424573 - Fax 424428

Innskrivingarseðil til skeið í innaneftirliti
Eind 1: ____ Set kross **Eind 2:** ____ Set kross **Eind 3:** ____ Set kross

Eftirnavn:	Føðingardagur:
Fornavn:	Starv/arbeiðspláss:
Gøta:	Tlf. arbeiði:
Postnr./stað:	Tlf. heima:
Teldupostur:	Gjaldari: